Kaspur, Jaspur og Jónathan hava úr at gera. Í øllum førum, tá teir skulu hugsa um, hvussu teir klára seg best við at gera sum minst

Mynd: Jonhard Hammer

Dólgar í mikudagsblaðnum

Sjónleikurin, Fólk og dólgar í Kardamummubýnum, er nú aftur at síggja á palli í sjónleikahúsinum í Havn.

Einki er at ivast í, at nógv børn kring alt landið við stórum spenningi síggja fram til at síggja hendan, og líka lítil ivi man vera um, at eins nógv foreldur gleða seg til til leikin. Talan verður sjávlandi um teir tríggjar, Kaspur, Jaspur og Jónathan. Suffiu mostur. Sebastian og nógv, nógv onnur, sum fara at vísa, hvussu lívið nú einaferð er í kardamummubýnum.

Í blaðnum í morgin verður stórt ummæli av leikinum, sum ivaleyst man teljast millum best umtóktu barnaleikir, sum hava verið á palli her á landi.

1984 - 2004:

Føroyingar savnast um Guds orð í Odense í 20 ár

GUDS ORÐ

Árni Helmsdal

Seinastu 20 árini hava vit - onkuntíð við millumbilum - savnast um Guðs orð í Odense á móðurmálinum. Tí móðurmál er hjartamál.

Vit byrjaðu ikki í 1984, tí skaldsøgan hjá George Orwell skuldi fara fram tá, og at vit gjarna vildu hava ein at halda okkum til, sum var yvir Big Brother.

Bæði í Odense og í mongum øðrum býum her á flatlondum var stór andalig signing millum føroyingar í teimum árunum, tá Føroyar vóru í tungari aldu fíggjarliga - eisini tí so nógv fluttu hendanvegin, og at mong ikki fluttu heim aftan á loknan lesnað.

Seinastu árini hevur tað ikki verið so nógv; men tað er kortini altíð ein gleði at savnast um Guðs orð á móðurmálinum. Tað riggar eisini best at luta andaligan humor á móðurmálinum. Tá eg hugsi um hesi 20 árini við felagsskapi um Orðið á føroyskum, so síggi eg tað sum glottar. Til dagligt eri eg í donskum umhvørvi og tosi danskt til arbeiðis og í kirkju/samkomu, tað er heldur enn ikki strævið onkuntíð, og so er tað sum at koma heim at sleppa at hoyra orðið og at sleppa at syngja og biðja á føroyskum.

Hesi árini hava vit fyri tað mesta savnast heima hjá teimum ymsu í og uttan fyri Odense - í 80´unum var Rasmus Rask kollegiið nærmast miðdepulin fyri andaliga verkið millum føroyingar her í Odense.

Eysturoyggin hevur verið høvuðssponsor av fólki til bíbliutímarnar í Odense, Klakksvíkin og Havnin hava verið nøkulunda javnar, og so hava nøkur fá verið aðrastanis frá - jú, jú, nakrir suðringar eisini.

Tá vit hava havt fundir og okkurt stórt tiltak, hava vit lánt onkran skúla ella Pinsa-, Baptist- ella Metodistkirkjuna.

Leygardagin 6. november klokkan 15 30 hava vit ein evangeliskan fund í sambandi við 20 ára haldið.

Vit savnast í teimum hølunum, sum vit oftast hava fingið innivist í hesi árini: í missiónshúsunum hjá Luthersk Missión, Vesterbro 9 B mitt í Odense.

Tú skal inn gjøgnum eitt skot (trongt portur?) millum Parykhuset og Pizzaria Italiano (har Søndergade kemur út í Vestergade/-Vesterbro). Tú skalt ikki lata teg foroskrekkja av einum tveimum messingskeltum, sum siga: Privat - adgang forbudt for uvedkommende. Tað er grannskoðarin, sum eisini húsast har, sum hevur keypt hesi skeltini. Eingin er óviðkomandi, tá tað snýr seg um at hoyra Guðs orð, og tú ert eisini sera vælkomin til drekkamuðin ein skerpikjøtsbita ella tveir og prátið aftaná. Sami grannskoðarin hevur eisini sett píkatráð á garðin kring parkeringsplássið aftan fyri, so har ber heldur ikki til at klatra uppum - einasta gongda leiðin er tronga portrið...

Øll hesi 20 árini hevur Øssur Berghamar vitjað og uppmuntrað okkum her í Odense, og hann verður eisini við tann dagin saman við øðrum úr Kristnastovu. Páll Dam Hansen var eisini við fyrstu 5-6 árini, og hann er eisini við leygardagin.

Býrt tú í Odense ella kemur framvið tann dagin, ert tú sera vælkomin at støkka inn á gólvið. Eg eri annars at hitta á 65 96 13 73 ella 30 25 13 73 arnihelm@post.tele.dk

ES. Eg haldi, at kjøtið kemur úr Kunoy.

TILTØK

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagin: Várgleði fyri børn.

Filadelfia
Landavegur 22
Í morgin kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli. Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Onnu Guttesen, evnið er: Umsorgan 1. partur, kl. 18 Missiónsmøti v/ Jens og Malenu Meitilberg.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-fri frá 8-16.
www.filadelfia.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taize) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum,Varðagøta 16.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Mikudag kl. 15 Bønarmøti. Mennirnir samlast kl. 19.30.
Hósdag einki Heimaforbund, men stór Árasøla sum byrjar kl. 19. Øll eru vælkomin at stuðla.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jastrid Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Tummas Jacobsen, Lee Hjaltalín syngur.
Mánakvøldið 8. nov. kl. 21. Felags Bønarmøti við lovsangi. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bibliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Birgir Poulsen talar. Evnið: Bibilskar meginreglur, sum økja persónliga lívsvirðið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ísraelsfundur á Kambsdali
Í kvøld kl. 19.30 heldur Jørn Nielsen úr Danmark almennan fyrilestur í Kafeteria í Ítróttarhøllini á Kambsdali um evnið: Støða Ísraels í miðeystri í dag. Øll eru vælkomin. Sangbólkur í Eysturoynni syngur hebraiskar sangir.

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Morgunmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

Betesda, Norðoyggjar
Sunnudag kl. 11 Minnismáltið Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími, Áps. kap. 13.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Mint verður á jólapakkarnar. Verið hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Týsdagin kl. 17 Juniormøti, kl. 20 Heimaforbundið.

Evangeliskur fundur í Ålborg
Leygarkvøldið 6. nov. kl. 19 Evangel. fundur í Daghammerskjolds gade 2, Ålborg. Talarar: Brøður úr Malta Hirtshals og onnur við. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 1. november
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
Týsdagin 2. november
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: **Frálæra í nýtslu av gongustavum**, Marita Tórsheim, fysioterapeutur
Mikudagin 3. november
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00-17.00 **Ágrýtin og gamal. Orðaskiftið við komandi býráðspolitikarar undir heitinum: »Vegamót har árini hittast«**
kl. 17.00–21.00: Opið hús
Hósdagin 4. november
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt taluprát, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Teldupprát
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 5. november
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eldrafelagið Kumlá
á Skála hevur hugnaløtu í húsum felagsins í kvøld kl. 19. Nýggir limir kunnu tekna seg.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólikaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 1. november
Vit lurta eftir seinasta brotinum av »Fram við landi« við Dánjal í Klingruni.

Dagtilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 1. november
Alla halgannadag er stongt
Týsdagin 2. november:
Hugnaløta við burturluting.
Mikudagin 3. november:
Vit fáa vitjan av lokalum valevnum til kommunuvali
Hósdagin 4. november:
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
Fríggjadagin 5. november:
OPIÐ HÚS.

Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Ørkin í Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov.: Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Aftaná verður kaffi á Ørkini.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbrøting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmødrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Heimasiða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Brúdleyp

Leygardagin 6. november giftast í Esbjerg Kristine Emig, dóttir Susanne Emig, Esbjerg og Arni Weihe, Hósvík, sonur Johan Weihe, Funning og Herdis Weihe, Strib, Fyn. Brúdleypsadr.: Matrosvænget 93, Hjerting, 6710 Esbjerg.

Silvurbrúdleyp

13. november hava Klara og Torfinn Hansen, Leirvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum 13. november kl. 19.00.

24. nov. hava hjúnini Kristina og Andras Nybo, Hósvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 20. nov. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 422435 ella 214416 til og við 7. nov.

Gullbrúdleyp

Leygardagin 6. november kunnu hjúnini Ingibjørg og Poul Nolsøe Mikkelsen, Klaksvík halda gullbrúdleyp. Tey eru stødd hjá dóttrini á Argjum, har opið hús er frá kl. 16.00. Adr. Reynstún 31, Argir.

HAVNAR BIO
Tlf. 311956
www.bio.fo

Týsdagin 02.11. kl. 20⁰⁰ Týsdagin 02.11. kl. 22³⁰
Mikudagin 03.11. kl. 20⁰⁰ Mikudagin 03.11. kl. 22³⁰
Hósdagin 04.11. kl. 20⁰⁰ Hósdagin 04.11. kl. 22³⁰

Týsdagin 02.11. kl. 19³⁰ Mikudagin 03.11. kl. 19³⁰
Hósdagin 04.11. kl. 19³⁰ – *Seinasta sýning*

Týsdagin 02.11. kl. 22⁰⁰ Mikudagin 03.11. kl. 22⁰⁰
Hósdagin 04.11. kl. 22⁰⁰ – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMAR

Frumsýning fríggjadagin 05.11

Frumsýning fríggjadagin 05.11

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.